3 frá 3'aranum

FLØGUUMMÆLI

NICLAS JOHANNESEN

The Corrs – unplugged

F‡ra systkin hugna sær vi› n‡ggjari útgávu

Umbor› á tí snøggu, snotuligu familjuskútuni spælir Corrs. F‡ra musikalsk systkin úr Írlandi – landi› vi› grønum grasi og sterkum melodiskum arvi – hava havt grø›arík ár gjøgnum 90'ini.

Her fært tú vandaleysan popp, dygt frambornan – ofta ílætin írsku fólkatónum, sum fyrst og fremst violin spælarin Sharon Corr bor›rei›ir vi›. Eisini ey›kenda sangarinnan Andrea Corr spælir tinfloytu. At tey veruliga duga at spæla hoyrist best á instrumental-lagnum "Toss The Feathers".

Og so fær tú enntá alt servera unplugged, spælt fyri MTV. Hetta "n‡ggja" konsepti›, sum 90'ini ríka›u heimin vi› hevur líka sum alt anna›, i› vísir seg at bera til, veri› rátroytt av øllum artistum vi› respekt fyri sær sjálvum.

The Corrs sleppa væl frá hesum ekseprimenti. Løgini liggja øgiliga tætt uppat teimum upprunaligu studio upptøkum, og tú hoyrir at løgini bera seg væl á einum akkustiskum guitar. "Only When I Sleep", "What Can I Do", "So Young" og "Forgiven Not Forgotten" eru allir klassikarar í Corrs kataloginum.

N‡ggja lagi› "Radio" er longu væl á veg at gerast eitt hit. Ongin kollvelting, null provokatión, men flott og frálíkt kortini.

Penur poppur til skikkilig fólk.

George Michael – Songs From The Last Century

Gjøgnumsúrga›ur poppari roynir seg sum big band sangara

Enski poppmeistarin – heimsins besti popp sangari, sum fleiri kalla hann – hevur leita› aftur í tí›ina, funni› nakrar av sínum yndissangum og sí›ani lati› teir í bigband-krydda›an Las Vegas búna saman vi› produsaranum Phil Ramone.

George Michael syngur swing. Hann syngur væl. "Brother Can You Spare A Dime", "Wild Is The Wind" og "My Baby Just Cares For Me" teljast millum útvaldu løgini. Hansara fraseringar eru fantastiska væl útførdar, hann liggur væl rytmiskt og dugir væl vi› dynamikkinum.

Hetta er kortini ikki nóg miki›.

Útgávan er tíverri fullkomiliga vandaleys og uttan naka› n‡tt element, sum ikki er hoyrt túsund fer›ir á›ur á annars so flottu jazzlei›ini. Hetta er klisje – kanska ikki fyri George Michael at syngja jazz, men fyri tónleikasøguliga afturhvarvi› er onki n‡tt undir sólini á "Songs From The Last Century".

Tú kanst spyrja teg sjálvan, hvør grundin er at geva út slíka fløgu. Svari› er sambært George Michael sjálvan, at hann elskar hesi løgini. Ta› eru eisini áhugaverdar løtur á "Songs From The Last Century". Eitt nú er útsetingin av gamla Police lagnum "Roxanne" flott og ø›rvísi frá upprunalagnum. George gevur sína egnu sera musikalsku og sterku tulking.

Hví kennist ta› kortini, sum okkurt vantar, tá 10. og sí›sta lagi› "Where Or When" er fari› afturum?

Kanska er orsøkin, at her liggur eisini ein farri av musikalskum snobbaríi í hesi útgávuni. "Songs From The Last Century" luktar av Big Money og Big Band. Men her er onki Big Bang.

"It has been, without doubt, the most fun I have ever had in a studio" sigur George Michael sjálvur innan í húsanum. Ta› skal vera honum væl unt.

Vónandi fer enski sangarin tó skjótt aftur til arbei›is og gevur eitt sindur meira av sær sjálvum enn bara talentríkar fraseringar til gamlar klassikarar.

Bob Marley – Chant Down Babylon

19 ár eftir dey›a sín er reggae kongurin úr Jamaica fløguaktuellur av n‡ggjum

Bob Marley, sáli, hevur givi› út n‡ggja fløgu. Reggae kongurin, sum doy›i av krabbameini bert 36 ára gamal, kann úr sínum himmali sta›festa, hvussu synir hansara royna at bera reggae arvin ví›ari. Ta› eru nevniliga The Marley Boyz, i› hava produsera› "Chant Down Babylon". Og nógvir kendir artistar taka saman lógvatak.

N‡ggj teknologi ger ta› solei›is, at tær n‡tist slettis ikki at vera á lívi fyri at kunna luttaka á n‡ggjum tónleiki – ikki solei›is at skilja, at løgini eru n‡ggj. Marley skriva›i øll á›renn sín alt ov snara dey›a.

Her er duettir vi› Lauryn Hill, Busta Rhymes, The Marley Brothers og teir bá›ar Steven Tylor og Joe Perry úr Aerosmith.

Reaggy er ein lívstílur, líkasum rapp. Bo›skapurin er PEACE, rastafari relegión og so ein rúgva av hash. Tónleikurin er sum vera man sera laid back. Ein Marley sonur hevur gjørt trummuprogrameringar til øll løgini. Og hóast fløgan hevur sínar løtur, so er hetta altso ikki tey sterkastu løgini, Marley hevur skriva› – langt frá. Hetta er jú ma›urin, sum skriva›i "No Woman No Cry", "I Shot the Sheriff" o.s.fr.

Eisini er gó›a gamla orkestri› hjá Marley – The Wailers – so ótrúliga nógv meira kompetent enn stirvnar rytmuprogrameringar. So um tú ikki kennir gomlu upprunaútgávurnar hjá Bob Marley, so er hetta avgjørt ikki sta›i› at byrja. Far so heldur eftir einum av teimum gomlu plátunum. Eitt nú "Burnin" frá 1973 vi› klassikarunum "Get Up Stand Up" og "I Shot The Sheriff" og eisini seinastu uppruna studio útgávuna hjá Bob Marley "Uprising" frá 1980 – ein klassikari vi› eitt nú lagnum "Redemption Song".

Eigur tí slíkar útgávur, so er Chant Down Babylon eitt fínt uppískoyti.

Viðmerking:

Nýtsluræturin til svartkjaftin

Sum væntandi var, so royna ávísir skipabólkar nú, hvør í sínum lag, at grundgeva fyri, hví júst teir hava framíhjárætt til at fáa tillutaðan føroyska partin av eini komandi svartkjaftakvotu, tá svartkjafturin í nærmastu framtíð væntandi verður kvoteraður.

Felagið Rækjuskip hevur noterað sær, at flakatrolararnir í Barentshavinum gera krav uppá at fáa tillutað stóran part av svartkjaftinum við tí grundgeving, at svartkjafturin er nýttur sum gjald fyri botnfiskakvotuna, frá serliga Russlandi, í Barentshavinum. Felagið Rækjuskip tekur ikki støðu til hvørt hetta er ein hóskilig grundgeving fyri at gera krav uppá svartkjaftin, men vit vilja hinvegin mótmæla, at tað verður ført fram at svartkjafturin er gjald fyri botnfiskakvotuna eina. Føroysk rækjuskip hava í nógv ár havt eina rækjukvotu á 3000 tons í russiskum sjógvi. Hendan kvotan hevur verið minkað av og á, fyrst og fremst fyri at hjálpa flakatrolarunum í tí balanseraður avtaluni við Russlands, soleiðis at teir kundu fáa nakað meira av botnfiskið, tá heildarkvotan er minkað. Á fyrireikingarfundinum í Fiskimálastýrinum síðst í november 1999, til samráðingarnar við Russland, bleiv Felagið Rækjuskip m.a. spurt, um rækjukvotan kundi lækkast, av tí at niðurskurðurin í toskinum var so stórur. Hesin fyrispurningur kom, hóast at flakatrolararnir ikki hava megna at uppfiskað sínar kvotur í Barentshavinum. Felagið Rækjuskip játtaði kortini fyri hesum við tí treyt og fyrivarni, at flakatrolararnir ella aðrir skipabólkar ikki løgdu forðingar í vegin fyri, at rækjukvotan kom uppaftur á 3000 tons, um tørvur bleiv á hesum seinni, og hevði ongin frá hvørki vinnuni ella Fiskimálastýrinum nakrar viðmerkingar til hetta.

Sum tað framgongur av tí balanseraðu avtaluni millum Føroyar og Russland fyri 1999, so stendur føroyska rækjukvotan umroknað til toskavirði fyri 34,52% av samlaða toskavirðinum av Russlandssáttmálanum. Hetta merkir, at rækjuflotin, við júst somu grundgevingum sum flakatrolararnir, kann gera krav uppá 61% av allari russisku svartkjaftakvotuni undir Føroyum í 1999, svarandi til 60.004 tons. Hesa nøgd vil rækjuflotin síðani kunna nýta í umbýtið við Russland fyri rækjur í russiskum sjógvi og á Flemish Cap, soleiðis sum felagið hevur víst Fiskimálastýrinum á, at áhugi er fyri. Ein skipabólkur afturat - kraftblokkaskipini - ger eisini krav um eksklusivan rætt til føroysku svartkjaftakvotuna, eftir at TAC er ásett. Felagið Rækjuskip vil, eins og flakatrolararnir, gera vart við, at tann svartkjaftakvota russar fáa í føroyskum sjógvi er fyri rættindi í Barentshavinum, harav 34,52%, svarandi til 60.004 tons, av tí svartkjaftakvotu russar fingu í 1999, var fyri rækjur. Vit vilja eisini vísa á, at Føroyar í seinastu avtaluni við Russland finguð eina nýggja kvotu á 10.000 tons av lodnu, sum kraftblokkaskipini helst koma at veiða. Hesa kvotu hava Føroyar goldið fyri, m.a. við at rækjukvotan lækkaði fyri ár 2000. Vit halda tí at tað ber til at staðfesta, at kraftblokkaskipini í 2000 hava økt um sínar veiðumøguleikar við eini nýggjari kvotu frá Russlandi, uppá bekostning av rækjuflotanum. Men samstundis gera teir eisini krav uppá svartkjaftin.

Vit vilja eisini vísa á, at tá talan er um ES-sáttmálan fyri 1999, hevði rækjukvotan í Eysturgrønlandi eitt toskavirði svarandi til 13,93% av samlaða toskavirðinum av avtaluni við ES. Eins og viðv. Russlandsavtaluni merkir hetta, at rækjuflotin, aftur við júst somu grundgevingum sum flakatrolararnir, kann gera krav uppá 92% av allari ES-svartkjaftakvotuni undir Føroyum í 1999, svarandi til 22.977,5 tons. Hesa nøgd vil rækjuflotin síðani kunna nýta í umbýtið við ES fyri rækjur í ES/grønlendskum sjógvi.

Viðurkennast má, at hesin nýggji háttur ið flakatrolarar og nótabátar nýta at gera krøv um kvotur galdandi er nýggjur og óvanligur. Felagið Rækjuskip kennir tað tó sum sína skyldu at gera vart við, hvussu stóran lut rækjuflotin eigur av svartkjaftinum sambært teim grundgevingum sum hinir skipabólkarnir hava víst á. Samanumtikið metir Felagið Rækjuskip, at tað er neyðugt at vinnan kemur til eina sínamillum semju í hesum málið, soleiðis at hetta ikki endar í einum innanhýsis stríði, har støðan er læst føst frá fyrsta degi av. Felagið Rækjuskip kann tí boða frá, at vit fegnir vilja gera okkara til, at komið verður fram til eina skynsama semju í hesum málið. Men so leingi sum ein slík semja ikki er gjørd, heldur rækjuflotin fast um krøv síni um sín stóra lut av svartkjaftinum sum gjaldsvøra fyri rækjur frá Russlandi og ES.



Jákup Egholm Hansen

Felagsins vegna
Jákup Egholm Hansen

Pensiónsgølan (2)

Broytingaruppskotini frá andstøðuni til pensiónirnar høvdu rættað flestu av skeivleikunum. Men samgongan feldi øll hesi uppskot - tíverri!

Andstøðan virkin:
Andstøðan í trivnaðarnevndini (Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin) kom við broytingaruppskotum, ið kundu rættað uppá nakrar av skeivleikunum sum nýggja lógin førdi við sær

• t.d. høvdu eftir okkara uppskotið allir pensionistar fingið meira,
• grundarupphæddin skuldi prístalsregulerast framyvir,
• munur ímillum „gift“ og „støk“ varð tikin burtur.
• Botnfrádrátturin hækkaði o.a.

Krokodillutár:
Men „sjálvandi“ feldi samgongan, íroknað umboð Tjóðveldisfloksins uppskot okkara, tí „hvad fatter (landsstýrið) gør, er altid det rigtige“. Landsstýrisuppskotið skuldi samtykkjast - sjálvt um tað var samansett av mongum skeivleikum, ið sjálvandi raka pensionistin beinleiðis, nú tað er sett í verk. So Tjóðveldisfloksins rødd í løtuni tykjast mær vera krokodillutár. Tí tað lekur ímillum teori og praksis tá ein vælvitandi samtykkir uppskot fult av feilum og síðan niðurgerð tað beint eftir. Hevði tað ikki verið rættari ikki at samtykt uppskotið við t.d. broytingum sum minnilutin mælti til?

Uppskotið:Eins og Fullveldið: konsekvensútgreiningar, ikki gjørdar og als ikki tiknar í álvara .
Ein fer at ivast í, um hetta uppskot yvirhøvur er konsekvensroknað áðrenn tað varð lagt fram á Føroya Løgting. Eiga slík uppskot at verða løgd fram uttan at slíkar útgreiningar eru gjørdar? Er ikki eitt ov vánaligt arbeiði gjørt, um slíkar greininar ikki eru gjørdar áðrenn uppskotið verður lagt fram?

Harra Løgmaður:
Tað tykist fullveldissamgonguni líkari at seta út í korti uttan konsekvensútgreiningar fyri borgaran.
Tá hesar fyriliggja, verður als ikki lurta eftir teimum í Føroyum ídag.

Slíkt hevur onki við hvørki politikk ella teknik at gera.

Slíkt er ábyrgdarleysur politikkur!

Var tað ikki tað, ið koyrdu Føroyar fallit.

Og var tað ikki tað, ið ikki skuldi henda aftur?

Umboðar løgtingsmaðurin veljaran ella landsstýri:
Hendan viðgerð setir fram nógvar spurningar:

Eigur løgtingsmaðurin ikki at verja sínar veljarar ímóti vánaligum uppskotum sum hesum? Skal eitt vánaligt Landsstýrismannaarbeiði við fullari megi sláa ígjøgnum í Føroya Løgtingi og vera samtykt heldur enn steðga ella broytt?

Eigur veljarin at verða tikin gísli orsaka av sínum løgtingsmanni, ið vil verja samgonguna heldur enn veljaran, sum vit síggja í hesum føri?

Tað varð gjørt í hesum føri, sjálvt um vit vistu at hetta uppskot hevði so nógvar skeivleikar, at gølan var vís um tað var samtykt av Føroya Løgtingi.

Er tað ikki samgongan við løgmanni á odda, ið hevur ábyrgdina av at skandaluuppskotið er lagt fram og samtykt?

Áttu løgmaður og samgongan ikki at tikið konsekvensin av hesi gølu og lagt frá sær?.

Gamla pensiónslógin eigur at halda fram fyribils:
Gamla pensiónslógin átti at veri sett í gildið aftur. Tó skuldu upphæddirnar verið reguleraðar upp frá 1 januar 2000. Sum andstøðan hevur lagt uppskot um fleiri ferðir síðan valið.
Ein nýggj pensiónslóg við ásetingum átti ikki at verið løgd fram fyrrenn hon var betri enn tað núgaldandi á øllum økjum. Eftir at hava verið til hoyringar hjá pensionistafeløgum, MBF og brúkarum annars, eins og konsekvensútgreina út í æsir.

Tað hevði verið gott fyri pensionistin - og sømiligt fyri Føroya Løgting.

Núgaldandi pensiónslóg er ein niðurgerð fyri mangan pensionist og ósømilig fyri bæði Landstýri og Løgting - tí hon er vánalig og órættvís.

Tað kunnu vit ikki liva við.

PS Broytingaruppskot frá andstøðuni í smb við 2 viðgerð er vert hjá samgonguni og øðrum at kveita eftir, nú neyðugt er at gera broytingar í lógini til tess at hon kann virka meira rættvíst.

Vinarliga
Marjus Dam,
Løgtingsmaður

REPROZ
GRAFISKAR LOYSNIR
Tel +298 31 95 40
Fax +298 31 75 41
Alt innan prentlutir
Mail: jakzac@post.olivant.fo